## DAGSINS MEINING

### Bygnaðarbroytingarnar lidnar?

Almenna miðfyristingin skal sambært samgonguni minka. Tað er helst uppá sítt pláss at minka um umsitingina, ið er voksin eksplosivt seinastu árini, men ikki er tað nóg mikið í sær sjálvum bara at koyra nøkur fólk til hús og so halda, at alt heldur fram, sum áður. Ein umfordeiling av uppgávum og arbeiði má til. Tað er ilt hugsandi, at færri fólk skulu gera tað sama, sum fleir fólk gjørdu áðrenn, uttan at mannagongdir og ábyrgdarbýti verða broytt.

Eftir at fólkatalið í umsitingini er minkað, so mugu tey, ið skulu leiða og fordeila arbeiðið inn á vøllin. Vit hava verið vitni til meir og minni hóskandi útmeldingar frá fakfeløgum á almenna arbeiðsmarknaðinum, eftir niðurskurðin í miðfyrisitingini.

Eitt nú bóru fulltúar á mál, at borgarin mátti insstilla seg til verri tænastu og at sami borgari helst mátti venja seg við longri svartíð uppá fyrispurningar til umsitingina. BLF kom harafturat við ikki sørt óhóskandi samanbering við áttatiárini.

Tað eigur at vera púra greitt, at tað eru tey, ið leiða og fordeila arbieðið, ið skulu gera tær raðfestingar, ið skulu til fyri at umsitingin kann virka undir nýggju fortreytunum. Tað er beinleiðis átaluvert, at starvsfólk alment rógva uppundir, at borgarin kemur at merkja eina verri tænastu, áðrenn nakrar raðfestingar hava funnið stað.

Um einki meir hendir enn at starvsfólkatalið lækkar, so kann ein verri tænasta koma uppá tal, men vónandi er hetta bert byrjanin til meiri umfatandi umskipanir, har hugt verður at dupultfunktiónum og hvussu raðfest verður.

Hví ger man til dømis ikki sum í Álandi, har so at siga øll lógaruppskot verða skrivaði av einari deild. Hinar deildirnar koma við tekniskum tilfari og leggja lag á, men ein deild skrivar uppskotini. Um hetta var gjørt, so fekk ein slík deild eina rutinu í lógarsmíði, og kanska kundu vit sloppið undan lóggávu, ið heilt einfalt ikki er nog væl skrivað, sum umboðsmansátalir og sakarmál hava víst seinastu árini. Kanska er Áland ikki eitt gott dømi av ymsum orsøkum, men hetta er vert at umrøða.

Aðrar bygnaðarbroytingar kundu verið felags lógardeild, felags innkeyp, felags vekslari og sekretariat o.s.fr. Kanska ber alt hetta ikki til av ymsum orsøkum, men hetta er í hvussu so er vert at kanna og umrøða.

Eisini kundi hugsast at vit í lógarsmíði kundu byrjað at rokna aftureftir, tá nýggjar lógir og kunngerðir verða settar í gildi. Alt ov ofta røkkur hugflogið ikki longur enn til at umseta ein danskan lógartekst við smávegis broytingum. Hvussu hevi verið, um man til dømis fyrst setti seg at hugsa um, hvussu ein lóg skuldi umsitast og hvussu nógvar ressoursir vit vilja brúka til umsiting av hesum. Ùt frá tí kundi man so skrivað lógartekstin og skipað umsitingina av økinum, heldur enn at umseta eina umsitingarliga tunga danska lóg og so yppa øksl tá rokningin kemur í form av øktari arbeiðsbyrðu.

Undir øllum umstøðum er, sum greinskrivari í Tinghelluni í Vikuskiftissosialinum eisini ger vart við, neyðugt við einum orðaskifti um almennu umsitingina. Hvussu halda vit fram og hvat vilja vit?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kommunan yvirtekur Kvøld-, Ungdóms- og Musikkskúlan

**Tórfinn Smith**
*Býráðslimur og valevni Javnaðarfloksins*



VAL04

Tórshavnar Kommuna eigur ongantíð ov skjótt at taka yvir alla ábyrgd og alla fígging av Kvøld- og Ungdómsskúlanum og Musikkðskúlanum við. Við hesi yvirtøku frá landi, kann ein samlað peningaupphædd fylgja við, sum er tað, landið í dag letur til hesar skúlar.

Á hendan hátt ber til hjá kommununi at leggja sín egna politikk í hetta virksemi. Ein stór og spennandi avbjóðing, har kommunali myndugleikin, so nær hann stendur borgarunum, fær møguleika at raðfesta, uttan allatíðina at vera bundin av hvørjum skerjingarlúnum landspolitikararnir eru í. Tíðin er farin frá skipanum, har bæði land og kommuna elta sama breyð. Vit eiga at fáa eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti, soleiðis at vit sleppa undan hesum æviga keglinum um, hvør hevur ábyrgdina av hvørjum,- landið ella kommunan.

Sum er hevur kommunan ábyrgdina at útvega og rinda fyri høli og tað sum hartil hoyrir. Tað er heilt greitt, men tá vit koma til lønirnar, kemur trupulleikin, sum nú eisini vísir seg.

Snýr tað seg um vanliga kvøldundirvísing og frítíðarvirksemi fyri børn, rinda land og kommuna hvør sína helvt. Er talan um serundirvísing, sum í stóran mun fevnir um menningartarnað og heilsubrekað, ber landið allar lønarútreiðslurnar, og sama er í sambandi við próvtøkulærugreinir, sum bera heitið royndarfyrireikandi undirvísing. Kommunan fær inntøkuna av skúlapengunum.

Tað óhepna við einum tílíkum tvíbýti av lønarútreiðslunum, sást nú, landsstýrið valdi at skerja, og setir harvið alla dagsskránna fyri hvussu mikið latast til skipanina. Gamaní kann onkur siga, so kann kommunan bara rinda so mikið meira, men tá er heldur eingin meining í einum frammanundan avtalaðum útreiðslubýti.

At skerjingin hesaferð rakti tey, sum bera brek, er stór skomm og til miklan skaða fyri tann bólk av okkara medmenniskjum, sum frammanundan er fyri vanbýti.

Ikki skulu vit gloyma, at skúlin, ella skúlarnir, vit her tosa um, eru landsins størstu. Kvøld- og Ungdómsskúlin við sínum millum 3- og 4000 næmingum, og Musikkskúlin við millum 5- og 600 næmingum.

# Lykilin um hálsin og fartelefon í lummanum

**Bjørg Joensen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*



VAL04

*Eg haldi, at kommunan skal byggja barna- og ungdómshús í nærumhvørvinum, har børn aftaná skúlatíð kunnu vera undir skipaðum viðurskiftum. Tað kundi verið ein fyrimunur at kombinera hús til yngri børn við ungdómshús soleiðis, at tey eldru børnini eisini fáa innivist aftaná skúlatíð og um kvøldarnar.*

Tá vit vóru børn í 70 -80 árunum, var einki stað at fara aftaná skúlatíð, har vit kundu vera saman við øðrum børnum og vaksin vóru um okkum. Nógv er broytt síðani tá, m.a. tað, at so at siga øll foreldur arbeiða úti. Hóast hetta er framvegis lítið broytt á økinum.

Tað órógvar familjur og harvið eisini arbeiðsmarknaðin, at børnini eftir skúlatíð ikki hava skipaðar umstøður. Lykilin um hálsin og fartelefonin í lummanum er ikki besta loysnin. Foreldur eiga at kunna fara til arbeiðis við vitanini um, at børn teirra eftir skúlatíð eru í tryggum hondum. Børnini hava hægstu raðfesting hjá foreldrunum, og tað eiga tey eisini at hava hjá kommununi.

Barna- og ungdómshúsini skulu ikki vera framhald av skúlanum, men eitt stað har børnini undir skipaðum karmum sleppa at royna seg og verða partur av eini heild í frítíðini. Tey skulu sleppa at verða kreativ, taka støðu fyri ella ímóti, og læra at siga frá, og gera sínar egnu royndir.

**Foreldur raðfesta børnini hægst, tað skal kommunan eisini.**

*Vit skulu tillaga kommununa eftir okkum, ikki øvugt.*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Frælsi og ábyrgd fylgjast!

**Annita á Fríðriksmørk**



Tað at hava fría fosturtøku merkir ikki at ein kvinna ella genta hevur lættari við at velja fosturtøku enn um ein lóg forðar henni í at taka avgerðina. Men tá hevur hon lættari við at gera tað lógligt, og nýtist ikki at fara av landinum. Og tað er tá hennara avgerð og ikki ein játtan frá einum lækna, - sum hon hevur bønað og biðið.

Haldi hinvegin at tað er sera umráðandi at frælsi og ábyrgd í hesum máli fylgja at. Soleiðis, at fær kvinnan frælsi til sjálv at gera av, um hon vil hava fosturtøku, so er tað so sanniliga eisini hennara og mansins ábyrgd at syrgja fyri, at hon ikki gert við barn. Soleiðis fært tú frælsi og ábyrgd at fylgjast!

Frí fosturtøkulóg eigur tí at verða fylgd av eini massivari upplýsing um fyribyrging umframt at møguleikarnir fyri fyribyrging altíð eru atkomuligir!

**Skal gentan ella læknin hava síðsta orðið**

At velja fosturtøku er eitt sera alvorligt val. Og tí eigur ein restriktiv lóg á økinum at verða skift út fría fosturtøku umframt massiva upplýsing um fyribyrging. Um gentan ella kvinnan kortini gert við barn og ynskir fosturtøku eigur hetta at verða gjørt við góðari vegleiðing, sosialráðgeving og upplýsing. Men høvuðsprinsippið eigur kortini at verða, at tað er gentan sjálv, sum eigur síðsta orðið í eini so tungari avgerð.

Í øllum Norðanlondum er fosturtøka frí, - uttan í Føroyum.

Her er støðan tann, at kvinnur ella gentur, sum eru við barn, og sum ynskja fosturtøku, skulu spyrja kommunulæknan hjá sær, um tær kunnu fáa fosturtøku.

Hendan mannagongdin er í stríð við nøkur grundleggjandi prinsipp:

Fyri tað fyrsta so er tað ikki hon sum er við barn, sum hevur síðsta orðið at siga, men læknin. Harvið sigur man at læknin er betri til at taka avgerðina enn kvinnan sjálv; - og er hetta ikki sørt at ómynduggera kvinnuna.

Harnæst eru allir læknar heldur ikki á einum málið um hesi viðurskifti, og vilja umsita og fortolka fosturtøkulógina ymiskt. Harvið eru allar ikki eins fyri lógini. Hon, sum er best fyri at grundgeva fyri síni neyð, er betur fyri ein, sum ikki eins væl dugir at leggja sær tey røttu orðini í munnin.

Men høvuðsprinsippið, - sum eftir hondin kann ljóða sum ein klisjé, hetta at kvinnan skal ráða yvir egnum kroppi, - verður ikki gingið á møti, so leingi hon ikki sjálv hevur síðsta orðið at siga í einum møguligum fosturtøkumáli. Tað er tí rættiliga mótsigandi at siga, at kvinnan skal ráða yvir sínum egna kroppi, men at hon ikki skal hava endaliga orðið í einum møguligum fosturtøkumálið. Nær ræður hon so yvir sínum egna kroppi: tá ið hon letur seg í, ella tá ið hon er undir brúsu?

**Ávirkar lógin fosturtøkutíttleikan**

Og fyri alt tað, so er ivasamt hvussu nógv tú forðar fosturtøku við lóg. Jú, hjá teimum gentum, hvørs ynski ikki verður gingið á møti, antin tí, at læknin hevur ein religiøsan ella etiskan hugburð, sum er í stríð við fosturtøku ella tí hann tulkar lógina restriktivt, - ella tí hon ikki dugdi nóg væl at bera síni sjónarmið fram, og sum tí ikki kann fáa eina ávísing um fosturtøku. Sær hon seg so heldur ikki føra fyri at fara til Danmarkar í fosturtøkuørindum, av fíggjarligum orsøkum, ella tí hon ikki veit, hvussu hon skal bera seg at tá ið hon er komin til Danmarkar, - fyri henni virkar ein lóg frá 1938, sum sigur nei til fosturtøku.

Fosturtøkutíttleikin er ein spegilsmynd av samfelagsetikkinum og sosialu støðuni hjá familjum og hjá samfelagnum. Og hesi verða tí avgerandi fyri hvussu tíðliga ungfólk byrja at hava seksuallív, hvussu væl vit upplýsa um fyribyrging, hvussu væl fólk fyribyrgja seg, nær ein kvinna/genta ynskir fosturtøku og nær hon ikki ynskir tað, og hvussu nógvar mammur eru tannáringar osfr.

Ofta verður ført fram, at okkara etiska grundarlag og mentan er so øðrvísi enn hjá grannum okkara, og at tað tí ikki er rætt við fríari fosturtøku herheima.

Sjálvsagt er okkara etikkur og mentan í stóran mun serføroysk, men vit eru eisini væl og viruliga ávirka av norðurlendskum og vesturlendskum virðum. Og hendan ávirkan er uttan iva sterkari í nýggjari tíð, enn hon nakrantíð hevur verið.

Men meina vit, at okkara mentan og etikkur eru av slíkum slag, at hetta er ein fosturtøkufyribyrging í sær sjálvum, so kann ein spyrja, hvat vit so skulu við so restriktivum lógum á hasum økinum.

# Sakni »sakliga viðgerð«

***Viðmerkingar til grein hjá Kristian Magnussen, løgtingsmanni í Sosialinum hósd. 14. okt. Greinin hevur heitið "Saknar fakliga sjónarmiðið"***

**Egon Øregaard**
*skúlastjóri*



KM.- *sigur seg als ikki kunna taka undir við at gera miðnámsdepil í Marknagili.*

Sjálvssagt virði eg hetta sjónarmiðið. Tó vil eg halda, at minsta kravið til KM, sum er framsøgumaður Javnaðarfloksins er, at hann kann koma við haldgóðum grundgevingum fyri hví Javnaðarflokkurin ikki tekur undir við ætlanini. Sjálvur meti eg ikki, at hann higartil hevur gjørt tað.

Eftir mínum tykki niðurger KM. tað arbeiðið, sum bygginevndin hevur lagt fram, m.a. kallar KM tað "nakrar leysar skitsur.." og nakað seinni sigur KM *"pappír er takksamt",* og í endanum av greinini staðfestir KM *"Hon (ætlanin) er ikki gjøgnumhugsað, ella lýst nóg væl!* Flestu onnur, eisini fakfólk, kalla "álitið" eitt valaarbeiði.

Bygginevndin arbeiddi ógvuliga miðvíst í útvið 1/2 ár við at fyrireika "álitið um Skúladepilin við Markna-gil". Fyrimunir og vansar vóru viðgjørdir, og vóru niðurstøðurnar gjørdar eftir gjølla umhugsan.

Eisini skal havast í huga, at framanundan at "álitið um Skúladepilin í Marknagili" sá dagsins ljós, hava allir tríggir skúlarnir, hvør í sínum lagi, í fleiri ár arbeitt við at gera m.a. hølisskráir, "tørvsanalysur" v.m. Í hesum arbeiði hava, í nógvum førum, lærarar og onnur starvsfólk verið við í arbeiðinum.

KM sigur: – ***Eg havi serliga saknað, at fakfólk sleppa at siga teirra hugsan,…***

Til hetta er at siga:
**Bygginevndin er mannað við:**

- Stjórunum á teimum trimum skúlunum, sum av **politisku** myndugleikunum eru valdir, og settir, at hava dagligu leiðsluna av skúlunum og hava námsfrøðiligu og fíggjarligu ábyrgdina. Haraftrat er uppgávan hjá stjórunum, at menna skúlarnar á øllum økjum. Tað undrar meg, hví KM als onki álit hevur á teimum í hesum málinum. **Eru hesir ikki fakfólk?**
- Stýrisformonnunum á FH og TST, sum eru valdir av, og umboða vinnuðlívið í útbúgvingarmálum á teimum báðum stóru yrkisskúlunum **- Eru hesir ikki fakfólk?**
- Inspektøri á Føroya Studentaskúli & HF skeiði **- Er hesin ikki fakfólk?.**
- Deildarsjórin fyri m.a. miðnáms og yrkisskúlarnar í Mentamálaráðnum **- Er hesin ikki fakfólk?**
- Formaður í bygginevndini er ein av okkara royndastu arkitektum í Føroyum, sum gjøgnum tey seinastu uml. 25 árini hevur verið við í ymiskum nevndum í samband við bygging av skúlum í Tórshavn og aðrastaðni í Føroyum **- Er hesin ikki fakfólk?**
- Arkitektur frá Landsverk hevur havt eygleiðarastøðu í bygginevndini **- Er hesin ikki fakfólk?**

Pappírið er takksamt sigur KM.- Men hetta er eftir mínum tykki tann best skikkaða nevndin, sum møguleiki var fyri at seta saman, til hesa uppgávuna.

KM sigur, a*t hann fer at krevja, at ein hoyring verður um hetta málið, har allir partar sleppa til orðanna.*

Í "álitinum um Skúladepilin við Marknagil" er hetta ein sera tíðandi táttur. Tá politikararnir hava tikið neyðugu avgerðina, og ætlanin um Skúladepilin verður sett í verk, kemur tað fyrsta. av 26 undirpunktum í "Arbeiðs - og tíðarætlan" við tað sama í kraft. Her stendur sum nr. eitt "Byggiskrá/brúkarahoyring".

Skal "álitið um Skúladepilin við Markanagil" til brúkarahoyring, sum CM setur sum krav, og øll viðkomandi skulu til orðanna, eru tað helst omanfyri 200 persónar, sum skulu siga sína hugsan - eyðsæð er hvat tá verður av ætlanini !!

– Vit hava valt okkara **politikarar** inn á Løgting til, at taka slíkar avgerðir.

Við tí vælaverkið í hond, sum "álitið um Skúladepilin við Marknagili" er, og við tí kunning, sum politisku umboðini, alla-tíðina kunnu gera brúk av, hevur politiski myndugleikin allar møguleikar, at taka "kvalifiseraðar" avgerðir.

# Fasta sambandið og ungdómurin

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum.*
*http://heima.olivant.fo/~eydgunn*



VAL04

Um áleið tvey ár er fasta sambandið inn á meginlandið veruleiki. Hetta fer millum annað at merkja, at foreldur skulu læra seg at liva við tí veruleika, at teirra børn, innan tey varnast tað, eru farin í Eysturoynna ella til Havnar í biograf ella í dans. Hetta er ein veruleiki, sum vit mugu taka í álvara, spurningurin er bara, hvat kommunan sum myndugleiki kann gera, so henda ferðsla verður so trygg sum gjørligt.

Fyri mær er ongin ivi. Flutningsprísurin til Klaksvíkar kann koma at verða eitt slag av forðing og harvið minka um kappingarføri hjá okkara vinnu. Tí eigur Klaksvíkar Kommuna at vísa á og vera við til, at møguleikar verða skaptir, so til ber at ferðast bíliga, eitt nú við bussrutu til Klaksvíkar. Líka so sjálvsagt er tað, at Klaksvíkar Kommuna skal verða við til at skapa karmar soleiðis, at okkara ungdómur fer yvir á meginlandið undir tryggum og skipaðum viðurskiftum. Hetta kundi eitt nú verið gjørt við, at náttbussur verður settur inn, so sum vit kenna tað millum Vágarnar og meginlandið.